Til Fíggjarmálaráðið

Ummælisskriv frá Fakfelagssamstarvinum viðv. “Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)”

Fakfelagssamstarvið takkar fyri møguleikan, at viðmerkja “Uppskot um Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)”.

Fakfelagssamstarvið vil við hesum undirstrika, uppá tað harðasta, at uppskotið á ongan hugsandi hátt má hava ávirkan á fría lønarsamráðingarrættin. Ei heldur má uppskotið á nakran hugsandi hátt verða avmarkandi fyri lønarsamráðingar og lønarsemjur í framtíðini. Verður hetta á nakran hátt dømið, vil Fakfelagssamstarvið taka neyðug stig fyri at steðga møgulig álop á fría samráðingarrættin og demokratiska rættin, ið hertil hoyrir.

Fakfelagssamstarvið

Starvsfelagið

Føroya Lærarafelag

Føroya Pedagogfelag

Akademikarafelag Føroya

Heilsuhjálparfelag Føroya

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar